# Føroyingar sýna áhuga fyri Televarpinum

**Føroyar Tele hevur stovnað felag at reka útvarps- og sjónvarpstænastu, og møguliga verður nýtt føroyskt útvarp ella sjónvarp sent á nýggja netinum**

TELEVARP
*Eyðun Klakstein*



*– Tá vit nú gera eitt nýtt sendinet, vildi tað verið skeivt av okkum at sagt, at vit bara fara at bjóða útlendskar rásir. Vit eru eisini áhugað í at frætta um góð føroysk hugskot, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri á nýggja Televarpinum*

Føroya Tele tók í gjár eitt ítøkiligt stig á leiðini fram móti nýggjari útvarps- og sjónvarpstænastu.

Føroya Tele stovnaði í gjár sítt fyrsta dóttirfelag, og tað eitur p/f Televarp. Felagið skal reka fjarskiftisnet og fjarskiftistænastur, og á vanligum føroyskum merkir tað, at felagið í fyrstu syftu skal veita føroyingum nýggja tænastu innan útvarp og sjónvarp.

Stovnandi aðalfundur var í felagnum mikukvøldið, og nevndin er mannað við fólki, sum hava tilknýti til Føroya Tele.

### Stjórin formaður

Stjórin á Føroya Tele, Andras Róin, verður nevndarformaður í nýggja felagnum, og afturat sær í nevndini hevur Heina Joensen, fíggjarstjóra, og Hákun Steingrímsson, sum er nevndarformaður í Føroya Tele.

Teir hava sett Trónd Djurhuus sum stjóra í felagnum, men hann heldur samstundis fram í starvi sínum móðurfelagnum, har hann stendur fyri menningini av nýggjum tænastum.

Føroya Tele ætlar at bjóða føroyingum, sum búgva á landsins stóru plássum, útvarps- og sjónvarpsrásir. Seinni kann felagið víðka virksemi hjá sær við øðrum tænastum, verður sagt.

– Fyrsta uppgávan hjá okkum verður at byggja felagið upp, og hvørjar tænastur, vit fara at bjóða seinni, veldst um, hvussu felagið fer at rigga, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri í Televarpi.

### Gera nýtt net

Fyrsta uppgávan hjá Televarp verður at skipa fyri einum nýggjum útvarps- og sjónvarpsnetið, sum kann breiða nýggju tænastuna út til fólk í Havn, Klaksvík og onnur størri pláss í landinum. Talan verður um tveir triðingar av føroysku húskjunum, sum kunnu røkka signalinum hjá Televarpi.

Ætlanin er, at Televarp skal bjóða føroyingum einar 20 sjónvarpsrásir umframt føroyskar og útlendskar útvarpsrásir. Felagið skal nú undir at gera sáttmálar við tey, sum eiga rásirnar, so at felagið fær loyvi at bjóða tær ymsu rásirnar út.

Enn er einki orð sagt um, hvørjar rásir talan verður um, men Televarp ætlar, at tað verða kendur og góðar rásir, sum felagið fer at selja.

### Nýtt føroyskt

Televarp ætlar eisini at geva góðum føroyskum hugskotum innivist á netinum.

Síðani tað kom fram, at Føroya Tele fór at skipa fyri hesi nýggju tænastu, hava áhugaðir føroyingar vent sær til felagið. Teir eru áhugaðir at frætta, um tað ber til at senda útvarp og sjónvarp á netinum hjá Føroya Tele, og tað ger tað.

– Tá vit nú gera eitt nýtt sendinet, vildi tað verið skeivt av okkum at sagt, at vit bara fara at bjóða útlendskar rásir. Vit eru eisini áhugað í at frætta um góð føroysk hugskot, men tað er púra greitt, er at Føroya Tele fer ikki at framleiða útvarp ella sjónvarp, sigur Tróndur Djurhuus.

Tað eru longu fleiri, sum hava vent sær til Føroya Tele, og onnur hava biðið um fund.

– Tað er stórur áhugi fyri framleiðslu av útvarps- og sjónvarpssendingum, men ofta er talan um fólk, sum duga væl at sita við ein pult, men sum ikki hava møguleikan at senda tilfarið. Her verður Televarp kanska ein nýggjur møguleiki, sigur Tróndur Djurhuus.

Televarp hevur møguleikan at seta pláss av til føroyskar útvarps- ella sjónvarpssendingar, og tað er eisini gjørligt, at broyta eitt signal til part av landinum ella í ein part av senditíðini.

Enn er einki ítøkiligt at frætta um føroyskar sendingar, men tað er greitt, at stórur áhugi er fyri at sleppa fram at sendinetinum hjá Televarp.

## Neyvan jólatrøll

Føroya Tele vil ikki seta nakað dato á, nær nýggja Televarpið fer at bjóða útvarps- og sjónvarpsrásir, og tað mest ítøkiliga stjórin vil vera er, at tað verður seint í heyst ella tíðliga í vetur.

Verður Televarpið jólatrøll?

– Nei, tað ætla vit ikki. Um tað verður jólatrøll, so verða vit vónbrotin, sigur Tróndur Djurhuus.

Tað ganga tí helst nakrir mánaðir, áðrenn Televarpið fer undir at senda útvarp og sjónvarp. Og tað ganga eisini nakrir mánaðir frá tí at fyrstu signalini verða send, til Televarpið røkkur øllum teimum økjum, sum teir hava sett sær fyri at røkka í fyrstu syftu.

**ek**

# Sami landsstýrismaður á netinum

Annlis Bjarkhamar er nýggja landsstýriskvinnan í mentamálum. Hon hevur sitið í sessinum í stívliga fimm vikur, men sambært almennu heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum, er tað Óli Holm, sum er landsstýrismaður.

Ráðini í almennu umsitingini veita eisini tænastu umvegis internetið, og so at siga øll hava seinastu mánaðin dagført sínar upplýsingar, nú nýggj landsstýrissamgonga hevur tikið við.

Heimasíðan hjá Føroya Landsstýri hevur broytt manningina á landsstýrisliðnum, og tað sama hevur Trivnaðarmálaráðið gjørt. Men á Mentamálaráðnum hava tey sama landsstýrismann – á netinum í øllum førum.

Skalt tú umvegis heimasíðuna hjá teimum hava fatur í toppinum innan mentamál í Føroyum, so skalt tú senda venda tær til Óla Holm. Um hann framvegis hevur myndugleikan er helst ein onnur søga…

**ek**


Bygnaður

- Landsstýrismaður í Undirvísingar- & Mentamálum
  Óli Holm teldupostur
- Aðalstjóri
  Petur Petersen teldupostur
- Fólkaskúladeildin o.a.
  Deildarstjóri: Olaus Jespersen teldupostur
- Vinnu- & Miðnámsskúladeildin
  Deildarstjóri: Eyðgunn Samuelsen teldupostur
- Mentamáladeildin
  Deildarstjóri: Jóannes Dalsgaard teldupostur
- Aðalskrivstovan
  Próvstovan, Lønarstovan

Stovnar, skúlar o.a. undir UMMS

Stuðulsstovnurin

YVIRLIT



# Stóð ikki við frágreiðing

**Tað avgerandi vitnið stóð ikki við sína upprunaligu frágreiðing, tá hann skuldi vitna móti 36 ára gamla dananum í narkomálinum. 10 kilo av hassji gjørdust brádliga til 80 gramm. Tann ákærdi fekk 30 dagar afturat teimum 33 mánaðunum, sum hann longu hevur fingið**

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*



*Føroya Rættur viðgjørdi fyri seinastu ferð ákærur móti einum 36 ára gomlum manni, sum høvuðsákærdur í stóra narkomálinum. Landsrætturin tekur málið upp í september*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Dómarin fann tann ákærda sekan í at hava selt 740 gramm av hassji, og tað gevur 30 dagar afturat handan rimar. Harumframt skal hald leggjast á 37.000 krónur, sum er vinningurin av søluni. Hetta var niðurstøðan, tá Føroya Rættur viðgjørdi tríggjar tær seinastu ákærurnar móti tí 36 ára gamla dananum í stóra narkomálinum, sum nú hevur fingið fongsulsrevsing á tvey ár og tíggju mánaðir.

Tann dømdi valdi at kæra revsingina til Landsrættin, tí hann metir ikki, at dómarin kann geva honum harðari revsing, enn hann longu hevur fingið.

Ákæruvaldið fer hinvegin at royna at fáa revsingina herda, tí tað kravdi fongsulsrevsing í 9 mánaðir, og at hald skuldi leggjast á 533.000 krónur.

Tveir menn vóru møttir sum vitni í rættinum mikudagin. Teir vóru báðir til skips, tá rættarmálið var fyri á fyrsta sinni.

### Stóð ikki við frágreiðing

Tað var heldur snópisligt hjá ákæruvaldinum, tá eitt avgerandi vitni í málinum móti tí høvuðsákærda í narkomálinum ikki vildi kennast við ta frágreiðing, sum hann áður hevur givið undir politiavhoyring tann 18. apríl og í rættinum tann 19. apríl.

Hann hevði tá greitt frá, at hann hevði keypt minst tíggju kilo av hassji frá tí ákærda síðan 1988. Hetta vil hann tó ikki kennast við longur, tí nú vil hann bara játta at hava keypt 80 gramm av hassji frá ákærda. Hetta kom tó ikki óvart á ákæruvaldið, tí maðurin, sum vitnaði mikudagin, var sjálvur á ákærubeinkinum mánadagin, og tá játtaði hann bara tey 80 grammini.

Dómarin vrakaði tí tær gomlu frágreiðingarnar og tók ta seinastu til eftirtektar, tí hon var givin undir vitniábyrgd, og tað vóru hinar ikki.

Dómarin hefti seg við, at vitnið og tann ákærdi ikki hava kunnað havt samband hvør við annan í longri tíðarskeið, tí vitnið hevur bæði siglt nógv og búð eitt skifti í Danmark.

### Undir trýsti

Maðurin varð spurdur, hví hann hevði givið løgregluni og dómaranum skeiva frágreiðing at byrja við. Hann greiddi frá, at hann hevði verið undir stórum trýsti frá løgregluni, og hann var bangin fyri, at hann skuldi inn at sita, um hann ikki skrivaði undir frágreiðingina, sum løgreglumaðurin hevði skrivað.

Hann legði tískil løgregluna undir at hava lagt honum orð í munnin og at leggja hann undir trýst. Hetta hava fleiri onnur vitni í narkomálinum eisini sagt, tá tey ikki vilja kennast við áður givnar frágreiðingar.

Málið móti hesum vitninum heldur fram týsdagin í næstu viku, tá tað seinasta vitnið skal geva sína frágreiðing.

Síðani var løgreglumaðurin, sum hevði framt avhoyringina á løgreglustøðini, kallaður inn sum vitni. Hann greiddi hinvegin frá, at maðurin sjálvur hevði sagt, hvussu nógv hassj hann hevði keypt frá tí ákærda, og at hann ikki hevði lagt honum orð í munnin.

Eitt annað vitni var eisini í rættinum mikudagin, og tað var ein 45 ára gamal maður. Hann fekk dóm fríggjadagin fyri at hava keypt 660 gramm av hassji frá ákærda. Hann fekk 60 daga fongsulsrevsing, har 30 dagar vóru treytaðir.

Hann játtaði tað sama, nú hann var innkallaður sum vitni. Hann hevði keypt 300 gramm at selja vinum og kenningum, og 360 hevði hann keypt til egið brúk.

36 ára gamli danin er nú dømdur fyri at hava selt tíggju kilo av hassji og smuglað tvey kilo av hassji. 54 gramm av kokaini og 25 gramma av amfetamini hevur hann eisini fingið dóm fyri at selja.

Málið móti 36 ára gamla dananum verður tikið uppaftur tann 23. september, tá Landsrætturin fer at viðgera tað.

# Ungir blásarar spæla í Disneyworld

**Hósmorgunin fór Havnar Ungdómshornorkestur til Frankaríki, har tey skulu spæla fýra konsertir. Tey eru m.a. sloppin at spæla einum palli í Disneyworld í Paris, har pláss er fyri 3.000 áhoyrarum**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*



*Havnar Ungdómshornorkestur fór hósmorgunin avstað til Paris, har orkestrið fer at hava eina konsert í Disneyworld. Seytjan spælarar í aldrinum 11-16 ár eru við á ferðini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað vóru nakrir sera spentir ungdómar, sum fóru við flogrutuni av Farstøðini í gjáramorgunin. Tað var Havnar Ungdómshornorkestur, sum fer avstað til Paris, har tey skulu spæla horntónleik fyri parisbúgvum.

– Hetta er blivin ein vani, at vit á hvørjum ári fara uttanlands at spæla. Í ár gongur leiðin so til Frankaríki, og tað gleða vit okkum til, sigur ein av limunum í hornorkestrinum, Dávur Magnussen, sum hevur tikið sær venjingini tann seinasta mánaðin.

Fyri tveimum árum síðani vóru teir ungu blásararnir í Bergen í Noregi, og í fjør gekk leiðin til Aberdeen í Skotlandi.

Dávur sigur, at tey eru meira spent uppá hesa ferðina, tí áður hava tey staðið og spælt á onkrari tilvildarligari gøtu í Bergen, men í ár eru tey sloppin á pall í Disneyworld.

Tey hava søkt um at sleppa framat í ævintýrlandinum hjá Walt Disney og fingu játtandi svar eftir at hava sent bond við tónleikinum hjá orkestrinum til fyriskipararnar. Í hesum døgum skipar Disneyworld fyri einum tiltaki, ið nevnist Magical Music Days, og tað er ein liður í hesum tiltaki, at hornglaðir ungdómar úr Havn sleppa at framføra sín tónleik. Tey vænta, at eini 2-3.000 fólk fara at vitja konsertina hjá teimum.

Tríggjar aðrar konsertir vera í París, men fyri at sleppa framat á hesum støðum hevur orkestrið goldið pening, og tað sigur nakað um tað tónleikaumhvørvið, har Havnar Ungdómshornorkestur fer at spæla.

### 17 blásarar

Tilsamans seytjan spælarar í aldrinum 11 til 16 ár eru við á ferðini umframt fýra foreldur. Tey hava vant saman allan vetur, og lærari hjá teimum er Kenneth Philip Jones, sum er úr Wales. Hann hevur verið í Bretlandi í summarfrítíð, og hann stendur fyri orkestrinum í París.

Dávur Magnussen greiðir frá, at orkestrið fer at spæla horntónleik, sum er lættur hjá fólki at lýða á. Hann nevnir verkini »Music to watch girls by« og »Jeepers creepers«. Harumframt fer hornorkestrið at spæla nakað av klassiskum tónleiki. Hetta er meira lívligur tónleikur enn vit kenna frá Havnar Hornorkestri og GHM.

Ferðalagið kemur heimaftur til Føroyar 12. juli.